ítróttur

Nr. 200 • mikudagur • 17. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Landsliðsvenjari settur

Lars Nedergaard, sum her situr ímillum Frank Jacobsen og Petur Ova Petersen, verður komandi tvey árini landsliðsvenjari hjá føroyska mansliðnum í hondbólti
Mynd: Álvur Haraldsen

Hondbóltssambandið hevur gjørt avtalu við danan, Lars Nedergaard, um at venja føroyska mansliðið í hondbólti komandi tvey árini

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað hevur leingi ljóðað, at nýggjur landsliðsvenjari var funnin til føroyska manslandsliðið í hondbólti, og fríggjadagin í farnu viku kundi HSF so bjóða til tíðindafund, har samstarvið millum partarnar varð almannakunngjørt.

Ikki nýggjur

Talan er um danan, Lars Nedergaard, og hóast talan soleiðis er um útlendskan venjara, so er talan ikki um nakran ókunnugan mann í føroyskum hondbólti. Lars Nedergaard hevur føroyska konu, og fyri nøkrum árum síðani var hann í starvi sum høvuðsvenjari hjá VÍF, og hevði hann tá millum annað ábyrgdina av fleiri av teimum leikarum, sum í dag gera um seg á besta mansliðnum í landinum.

Umframt venjaraavtaluna við Lars Nedergaard hevur HSF eisini gjørt avtalu við Frank Petersen. Hesin er annars í starvi sum fysiskur venjari hjá danska hondbóltssambandinum, og tað er fyrst og fremst í hesum sambandi, at avtalan er gjørd.

Hetta við væntandi fysiskari venjing var annars eisini nakað, sum varð havt á loftið, tá mansliðið fyri einum ári síðani spældi tríggjar EM-undankappingardystir, og í samrøðu við Útvarpið fríggjdagin legði nýggi landsliðsvenjarin eisini áherslu á tørvin á hesum. Ein tørvur, sum ætlandi skal loysast í einum langsiktaðum samstarvi við ymsu feløgini kring landið.

Avbjóðingar

Síðani tað varð greitt, at eingir altjóða dystir hjá landsliðnum verða á skránni fyrr enn komandi ár, hevur ein hin størsti spurningurin verið, hvussu verður við avbjóðingum hjá landsliðnum.

Enn tykist hetta heldur ikki vera heilt greitt, og einasta, sum kann sigast við vissu er, at liðið fer at taka lut í EM-undankappingini um tvey ár. Fram til ta tíð verður so sjálvandi eisini neyðugt við øðrum avbjóðingum, og sum skilst, so verður eisini arbeitt við, at liðið kann fáa nakrar dystir.

Eisini verða regluliga venjingar hildnar, og við Útvarpið segði Lars Nedergaard, at talan helst fer at verða mánaðarligar landsliðssavningar, har talan verður um bæði venjing og fysiskar royndir av ymsum slag.

Jónleif til kvinnurnar

Tað er tó ikki bert á manssíðuni, at HSF hevur leitið eftir landsliðsvenjara. Sum vit hava skilt tað, var ætlanin eisini, at nýggjur venjari hjá kvinnulandsliðnum skuldi setast formliga í starv fríggjadagin, men allir smálutir hesum viðvíkjandi eru tó ikki komnir upp á pláss enn.

Venjarin, sum talan hevur verið um í hesum føri, er núverandi Kyndilsvenjarin, Jónleif Sólsker, og væntandi verður tað eisini hann, sum verður settur í starvi, men hetta kann so ikki staðfestast, fyrr enn partarnir hava fingið pappír upp á hvønn annan.

Hjá kvinnulandsliðnum er somuleiðis eitt sindur ivasamt, hvussu verður við avbjóðingum fram il EM-undankappingina í 2003. Møguliga verður liðið teknað til sonevndu Challenge-Cup kappingina, sum er ein hondbóltskapping fyri tær heldur veikaru hondbóltstjóðirnar, men heldur ikki her er nakað endaliga fastlagt enn.

Frederiksberg Volley vann 3. dystin

Sunnudagin var 3. umfar í elitudeildini hjá donsku flogbóltskvinnunum leikt. Kvinnuliðið hjá Frederiksberg Volley leikti móti Randers, og Frederiksberg vann dystin 3-1.

Áður í hesum kappingarárinum hevur Frederiksberg vunnið 3-1 á bronzu-vinnarunum frá í fjør, sum er Gentofte og tapt 3-0 fyri Holte, sum fór avstað vid silvurinum í fjør. Liðið hevur sostatt 4 stig nú. Á liðinum hjá Frederiksberg spæla Alvilda Ólavsdóttir og Annika Joensen, sum báðar vóru við til at tryggja Føroyum gull á Isle of Man í summar. Atlantic Airways stuðlar teimum føroysku landsliðsleikarunum, sum spæla í Frederiksberg.

Næsta vikuskifti verða eingir dystir, so Frederiksberg skal ikke í eldin aftur fyrr enn 27. oktober, og tá er tað gullvinnararnir frá í fjør, sum eru DHG frá Odense, sum fáa vitjan frá Frederiksberg.

Fossánes er ikki við

Hóast vit nóg illa eru komin í holt við landskappingina, so er longu greitt, at kappingin í meistaradeildini hjá kvinnum bert fer at telja fimm lið í ár.

Orsøkin er, at Fossánes, sum fyri fyrstu ferð spældi í meistaradeildini í fjør, hevur trekt liðið hjá sær út kappingini.

Hetta hevur sjálvandi ført fleiri avlýsingar við sær, sæð í mun til kappingarskipanina, men tey, sum hava atgongd til alnetið, kunnu síggja dagførdu skipanina á www.fbf.fo.

-jm

Leygardagin tryggjaði Skála sær fyri fyrstu ferð uppflyting til bestu deildina, og nú er greitt, at tað verður Mathias Davidsen, sum fer at hava ábyrgdina av liðnum. Hetta er samstundis fyrsta ferðin, at Mathias fer at royna seg sum venjari í bestu deildini
Mynd: Álvur Haraldsen

Mathias skal venja Skála

Nýggi formaðurin heldur, at felagið hevur grundarlagið, sum skal til fyri at gera eina roynd at standa seg í fremstu rað

NÝGGJ AVBJÓÐING
Jóannes Hansen

Skálamenn eru longu farnir undir fyrireikingarnar til størstu avbjóðingina í fótbóltinum, sum teir nakrantíð hava staðið yvirfyri.

Undan vikuskiftinum segði Asbjørn Mikkelsen, at hann og hinir báðir veteranarnir, sum høvdu ábyrgdina í teimum seinastu dystunum, ikki fóru at halda fram í 1. deild. Nú verður sagt av Skála, at Mathias Davidsen skal vera venjari.

Í hesi vikuni er Mathias við U–17 landsliðnum í Sveis. Hann hevur verið dúgligur at tikið lut í venjaraskeiðunum, sum FSF hevur skipað fyri, hann hevur seinastu árini havt ábyrgdina av U–17 landsliðnum, og hann hevur í fleiri ár verið venjari í NSÍ.

Í síni tíð spældi Mathias við B68 – fyri tað mesta á næstbesta liðnum. Tað vil við øðrum orðum siga, at nýggja liðið í 1. deild fer at royna seg við einum venjara, sum – hóast hann hevur verið venjari leingi – fer at royna seg fyrstu ferð í bestu deildini.

Fleiri skulu bera

Kurt Rasmussen er formaður í Skála Ítróttarfelag. Tað hevur hann verið síðani í summar. Aðalfundurin, sum sambært viðtøkunum skal vera í februar, varð fleiri ferðir útsettur. Tað vóru fáir herðar, sum bóru felagið, og tað tóktist ganga illa at fáa nýtt fólk í nevndina og at taka formansuppgávuna á seg. Men so tók Kurt Rasmussen uppgávuna á seg, og síðani hava teir á Skála roynt at fingið fleiri at taka ábyrgd.

– Skála er eitt rímuliga stórt felag, og vit royna at fáa so nógv at vera uppií, sum tað ber til. Umframt høvuðsnevndina hava vit eina ungdómsnevnd, eina vaksnamannanevnd, eina sponsornevnd og eina aktivitetsnevnd. Á henda hátt vóna vit at uppgávurnar verða røktar av fleiri, enn tær áður hava verið, og tá setningarnir hjá hvørjum einstøkum eru nágreiniligir, so skuldi tað borið til, uttan at tað kendist alt ov tyngjandi.

Grundarlagið er har

Tá tað snýr seg um komandi kappingarár, so hava teir á Skála ikki enn gjørt so nógv annað, enn at seta nýggja venjaran.

– Vit rokna við, at tað fyrst og fremst vera spælararnir, sum hava spælt liðið upp í 1. deild, sum skulu bera liðið. Málið verður í fyrstu atløgu at tryggja sessin í bestu deildini. Tað er ein avbjóðing í sær sjálvum, heldur formaðurin í Skála Ítróttarfelag.

Ætla tit at fáa spælarar aðra staðni frá til felagið?

– Tað fara vit at tosa við venjaran um. Vit hava nógvar spælarar, og tað er kanska møguleiki fyri, at onkur verður umskúlaður til nýggjan leiklut. Onkur við royndum í 1. deild hevur spurt seg fyri, og vit bjóða øllum at vera vælkomnum at venja við okkum. Men tað verður bara, um venjarin heldur, at liðið skal styrkjast á ávísum plássi, at vit fara at royna at heita á onkran spælara um at hjálpa okkum, sigur Kurt Rasmussen, sum roknar við, at tað skulu fleiri pengar til at reka felagið, og sum samstundis vónar, at inntøkurnar fara at økjast, nú Skála fyri fyrstu ferð skal royna seg í fremstu rað í fótbólti.

Mjørkin steðgaði Vejle

Fyri fyrstu ferð síðani í 1978 noyddust teir í Vejle at avlýsa, tí tað var so tjúkt í mjørka

MJØRKADYSTUR
Jóannes Hansen

Í Føroyum er tað meiri enn so komið fyri, at mjørkin hevur verið so mikið tjúkkur, at tað hevur verið torført at spæla fótbólt. Men tað er sjáldan ella næstan ongantíð komið fyri, at dystir hava verið avlýstir orsaka av mjørka – hvørki landskappingardystir ella altjóða dystir. Men tað hevur ofta verið tosað um, um tað hevur verið ráðiligt at spæla, sjálvt um tað hevur verið spælt.

Mánakvøldið varð ein dystur í donsku superliguni steðgaður, tí tað var ov nógvur mjørki. Vejle hevði vitjan av Viborg. Í 1. hálvleiki var sýnið hampuliga gott, men fram ímóti steðginum tók at myrkna, og tá spælararnir komu á vøllin eftir hvíldina var so tjúkt, at dómarin gjørdi av at gevast.

– Av miðjuni sá eg ikki í endarnar á vøllinum, og linjudómararnir sóu ikki tvørtur um vøllin. Tí var einki annað at gera enn at blása dystin av, segði dómarin, sum bríkslaði fyri síðstu ferð, tá 2. hálvleikur var tríggjar minuttir gamal.

Stadion í Vejle liggur í tiltikna vakra umhvørvinum í Nørre skóginum. Tað er ikki komið ofta fyri, at tað hevur verið neyðugt at avlýsa orsaka av mjørka. Onkur í Vejle visti mánakvøldið at siga, at síðst ein dystur varð avlýstur í Vejle orsaka av mjørka var í 1978.

Tá dómarin steðgaði dystinum í Vejle, var støðan 0–0. Vejle hevði verið omaná í 1. hálvleiki, og tí iðraðu teir seg. Viborg venjarin iðraði seg, tí hann segði, at teir í steðginum høvdu funnið út av, hvussu teir skuldu vinna á Vejle!

Francis fekk sekkin

Birmingham venjarin, sum leingi hevur sýnt stóran áhuga fyri Toda Jónsson, er farin frá

ONGLAND
Jóannes Hansen

Fyrr í summar var nógv frammi um, at enska 1. deildar felagið Birmingham var áhugað í at keypa fleiri spælarar frá FCK, og Todi Jónsson varð nevndur millum hesar. Tað var um reppið, at miðvallarin Christian Poulsen fór til Birmingham, men nú er alt hetta dottið niður fyri.

Í fyrradagin frættist, at maðurin, sum hevði serligan áhuga í dønskum spælarum, og sum leingi droymdi um at fáa Toda Jónsson at spæla á sínum liði, ikki longur hevur ábyrgdina í Birmingham.

Talan er um Trevor Francis, sum í síni tíð var ein fínur fótbóltsspælari. Mánadagin boðaði Birmingham frá, at Trevor Francis ikki longur er venjari hjá teimum. Partarnir skiltust í bestu semju, varð sagt, men eingilsku fjølmiðlarnir siga, at venjarin hevur fingið sekkin, tí úrslitini hava ikki verið nóg góð. Birmingham kappast fyrst og fremst við Aston Villa um tekkið hjá teimum fótbóltshugaðu í næststørsta eingilska býnum. Teir vilja fegnir vera í bestu deildini, men tað gonst illa at sleppa upp úr næstbestu deildini.